# Spælibólkar

Í Tofta skúla leggja vit stóran dent á, at næmingarnir trívast í skúlanum, vitandi, at hetta er ein fyritreyt fyri, at næmingarnir læra. Sum liður í at skapa trivna og samstundis at fyribyrgja happing, hava vit valt at skipa fyri spælibólkum.
Endamálið við at hava spælibólkar er at styrkja um felagskapin í flokkinum. Næmingarnir koma í bólk saman við næmingum, ið tey ikki vanligani eru saman við og fáa høvi at læra hvør annan betur at kenna. Tað er somuleiðis fyribyrgjandi ímóti happing, at børn vitja heimið og møta foreldrunum hjá hvør øðrum.

Tað eru 4 næmingar í hvørjum spælibólki. Bólkarnir hittast 1-2 ferðir um mánaðin. Spælibólkarnir byrja eftir summarfrítíðina og nýggir bólkar verða gjørdir eftir jólafrítíðina. Bólkarnir skiftast um at hittast heima hjá hvør øðrum. Tann, ið stendur ovast á listanum, hevurbólkin fyrstu ferð o.s.fr. Um ikki liggur fyri at hjá onkrum til ásettu tíð, er tað teirra ábyrgd at býta um við onkran annan, so bólkurin ikki steðgar upp

Børnini skulu ikki vera á nøkrum skíggja (playstation, sjónvarp, telefon, o.a.) Bólkarnir verða sum heild settir soleiðis saman, at tey, ið vanliga fylgjast, ikki eru í bólki saman. Tað er tí sera gott, um foreldrini kunnu práta við barn sítt, áðrenn spælibólkin, um hvat tey kundu farið at gjørt saman. Tað er ikki ætlanin at tíð verður nýtt at finna semju, um hvat tey skulu gera, tá ið øll eru komin. Tað er tann, ið hevur bólkin, ið kann avgerða hetta.  Tá ið spælibólkurin er, er somuleiðis umráðandi, at foreldrini eru til staðar og kunnu tryggja, at børnini hugna sær og at øll eru við.
Ynskiligt er, at foreldrini líka steðga á, kanska til ein kaffimunn, tá børnini verða heintað.

| Vika | Bólkur 1 | Bólkur 2 | Bólkur 3 | Bólkur 4 | Bólkur 5 | Bólkur 6 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 40 - 41 | Maribel | Orlane | Beinta | Meinhardt | Heiðrun | Gunn |
| 43 - 44 | Øssur | Jógvan | Ezra | Tea | Emil | Karita Naomi |
| 45 - 46 | Teodora | Bára | Jakoba | Alfred | Benjamin | Aria |
| 47 - 48 | Aarush | Rókur | Kristian | Anastasia | Aurora | Sára |